## VIÐMERKINGAR

# Fremmand arbeiðsmegi - ja ella nei - ella…

**Jóan Carl Dam,**
*nevndarlimur í Havnar Arbeiðsmannafelag*

Spurningurin, um vit skulu hava fremmanda arbeiðsmegi í Føroyum ella ikki, hevur enn eina ferð elvt til tjak millum teir ymsu partarnar, ið onkusvegna vara av arbeiðsmarknaði okkara. Og er tað áhugaverda tjakið í SvF seinasta hóskvøld um hetta evnið, ið hevur fingið meg geva íkast í orðaskiftið. Eftir mínum tykki var tað bert Ingeborg Winther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, sum royndi at hava eina støðu í málinum. Stjórin í Vinnuhúsinum var skilagóður, sum hann vanliga er, men alt annað líka standa áhugamál arbeiðsgevaranna honum fremst í huga. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður royndi at halda við hinum báðum og annars ikki siga nakað »skeivt«.

Taki fult undir við Ingeborg Winther, tá hon sigur, at vit eiga at tryggja okkum so væl til ber, at føroyingar sleppa at arbeiða í Føroyum. At vit tryggja okkum, at fremmand arbeiðsmegi ikki verður flutt inn í landið til arbeiðsuppgávur, sum tøk føroysk arbeiðsmegi er til. Og eri eg eisini samdur í, at tað ikki er nokk í hesum sambandi bert at vísa til ALS. Soleiðis sum landsstýrismaðurin legði upp til. Tað er nevniliga soleiðis, sum Ingeborg Winther segði, at langt frá allir arbeiðsleysir føroyingar eru skrásettir í ALS. Tá tað snýr seg um at fáa fatur á arbeiðsmegi, snýr tað seg tí um at spinna eitt net, sum fevnir um meira enn eina telefonsamrøðu niðan á ALS. Ikki skrásett arbeiðsleys, sum ikki búgva har virksemi er, eiga sanniliga eisini at fáa sín møguleika. Tað snýr seg tí um at skipa og laga alt soleiðis, at nú arbeiði er til allar hendur og kanska væl tað, at arbeiði í hvussu er er til allar føroyskar hendur. Her eiga kommunur og arbeiðarafeløg at hava sín leiklut. Alt annað líka, átti tað at verið meira sjálvsagt og betri fyri ein føroyskan arbeiðsgevara at leita eftir fólki í landinum. Hetta heldur enn at leita uttanlands eftir fólki, sum skulu virka undir serligum – og kanska eisini undir serliga dýrum treytum.

**Undir hvørjum treytum**

Soleiðis sum samferðslukervið er útbygt, kunnu flest allir føroyingar ferðast millum heim og arbeiðspláss dagliga. Kemur fremmand arbeiðsmegi hendavegin, skulu so nógv onnur viðurskifti fáast upp á pláss. Líka mikið um tey fremmandu eru her í styttri ella longri tíðarbil, skulu tey hava sín lut í íbúðarmarknaðinum, sum longu er kaotiskur, tey skulu hava nakað til matna, og tey skulu eisini hava sín lut í øðrum samfelagsligum rættindum. Alt slíkt, sum arbeiðsgevarin skal gjalda meira og minni av, men sum lanskassin, orsakað av skattligum reglum, tó rindar, tá avtornar.

Tað man tó vera galdandi fyri størsta partin av fremmandu arbeiðsmegini, at hon kemur her fyri at vinna so nógv til ber eftir stuttari tíð. Her verður kanska mest hugsað um yvirtíðina, sum verður so hart skattað, at vanligi føroyingurin mest sum ikki hevur ráð til hana. Útlendingarnir eru jú komnir fyri at arbeiða, og fara teir tí avstað við stórum parti av yvirtíðararbeiðinum.

**Nógv virksemi**

Ein spurningur av týdningi í hesum sambandi er, um samlaða virksemið í landinum liggur á røttum støði, og um nakar er, sum avger, hvar hetta skal liggja. Vit minnast aftur í 80'ini, tá alt skuldi gerast í senn, skjótari enn skjótt. Ongin planlegging, ongin stýring. Tað kennist á mongum brøgdum, at vit eru ávegis móti støðu, sum minnir um hana í 80'unum. Tað er stórt spell. Tí tá fara vit heldur ikki at hava nakran møguleika at hava nakra meining um- og tíansheldur at ávirka spurningin um fremmanda arbeiðsmegi. Og tá so fremmandir arbeiðsgevarar eisini koma við síni fremmandu arbeiðsmegi, ja, tá fáa vit oman á at fáa eitt skattasirkus av format. Tá er stuttleiki landskassan søguligur.

**Myndugleikarnir kunnu gera nógv**

Lítið er at ivast í, at okkara politisku myndugleikar kunnu gera nógv fyri at bøta um støðuna. Tað snýr seg um at hava vilja at síggja tørvin hjá øllum pørtum í hesum sambandi. Politiski myndugleikin skal sjálvandi royna at slóða fyri hjá vinnuni, m.a. við góðum og neyðugum kørmum. Hetta má tó ikki gerast soleiðis, at fólkið og landskassin gjalda prísin. Hetta hendi í 80'unum, hetta má ikki henda ídag.

Myndugleikarnir skulu tí stremba eftir, at arbeiði í Føroyum fyrst og fremst er til føroyingar. At tað loysir seg hjá føroyingum at arbeiða t.d. yvirtíð. At samlaða virksemið verður bæði planlagt og stýrt soleiðis, at arbeiði verður til allar føroyskar hendur í allari framtíð.

Hinvegin fari eg at geva Ingeborg Winther so púra rætt í, at kemur fremmand arbeiðsmegi hendavegin, skal hon verða væl móttikin og ikki minni væl viðfarin.

# Teir søgdu ósatt

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



Tveir framstandandi landsstýrismenn úr Tjóðveldisflokkinum hava sagt, at danska stjórnin onki gjørdi fyri at hjálpa føroyingum í kreppuni, men haraftur-ímóti vann sær eyka rentu fyri at veita lán til føroyingar við hægri rentu, enn stjórnin sjálv hevði goldið.

Óteljandi ferðir verið ført fram, serliga frá tjóðveldismonnum, at ongin hjálpti føroyingum, tá kreppan leikaí harðast, og at vit sjálvi máttu berjast fyri at koma uppundan aftur.

At teir føroyingar, sum eftir vóru í landinum, máttu gjalda dýrt, kunnu vit skjótt semjast um, men at vit onga hjálp fingu, passar ikki.

Tíbetur liva vit í einum frælsum landi, har vit kunnu siga okkara hugsan hart, soleingi vit ikki skaða onnur, men landsstýrismenn kunnu ikki loyva sær at sleingja um seg við pástandum og ósannindum í sambandi við teirra starv.

**Rentan**

Spurninginum um rentuna, sum donsku kreppulánini kostaðu føroyingum, hava tjóðveldismenn dúgliga júkað um, og m.a. hava orð sum »okursrenta« verið nýtt.

Seinast spurningurin aftur var havdur á lofti, var tá fíggjarlógin 2002 var til viðgerðar á løgtingi.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum segði hetta beinleiðis undir viðgerðini, og um ikki landsstýrismaðurin við fíggjarmálum veit, hvat hann tosar um viðvíkjandi fíggjarmálum, hvør skuldi so vita?

Hann fekk góða hjálp frá landsstýrismaðurin við sjálvsstýrismálum, ið segði, at ongin sanering var farin fram, og at vit onga hjálp fingu. Hesin kom eisini við pástandum um rentuspurningin.

Báðir søgdu beinleiðis ósatt ! Teir ikki bara "fóru skeivir", sum onkur sigur, men teir søgdu ósatt !

Tað fingu vit skrivligt prógv um, nú ríkisumboðið hevur svarað fyrispurningi frá undirritaðu, um hvussu høga rentu talan í veruleikanum var um.

Tá spurningurin var viðgjørdur í løgtinginum í seinastu viku, frøddist løgmaður um svarið frá ríkisumboðnum, men hann greiddi samstundis frá, hvat var hent undir samráðingunum. Tað, sum í seinasta enda er tað mest áhugaverda, er úrslitið av samráðingunum, og tað sum undirskrivað er av pørtunum, tí tað verður tað, sum skal vera galdandi.

**Ikki serligur áhugi.**

Seinri hevur løgmaður í blaðsamrøðu sagt, hvat hendi undir samráðingunum, og hann ásannar, at landsstýrismaåðurin við fíggjarmálum fer skeivur,men hann ætlar sær annars ikki at gera nakað við málið. Hann ætlar ikki at brúka lógina um ábyrgd landsstýrismanna, tí tað ikki hevur fingið fylgjur fyri Føroyar, at landsstýrismennirnir hava sagt ósatt !

Hetta eiga vit at leggja okkum í geyma, tí hesir somu ætla sær at halda fram í samgongu aftaná komandi løgtingsval, tað hava bæði fólkafloks- og tjóðveldisfloksumboð sagt alment. Sostatt kann staðfestast, at tað verður góðtikið av báðum pørtum, at tað ber væl til at siga ósatt, so leingi tað tænir ávísum politikki, men annars ikki verður mett »at hava óhepnar fylgjur« fyri føroyska samfelagið.

Skulu vit góðtaka, at landsstýrismenn siga beinleiðis ósatt um viðurskifti, ið tæna onkrum ávísum flokki politiskt, hóast lógin um ábyrgd landsstýrismanna, ið viðvíkur ábyrgdini hjá løgmanni og landsstýrismonnunum fyri teirra embætisførslu, greitt sigur í gr. 5:

*Løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært lógini um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara.*

*Stk. 2 : Ásetanin í stk. 1 er eisini galdandi, um so er, at løgmaður ella landsstýrismaður gevur løgtinginum skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella um hann, tá løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins metting av málinum.*

Átti hetta ikki at fingið bæði almenningin og restina av fjølmiðlunum at vakna ?

Spurningurin um rentuna er nú svaraður, og skjøl eru løgd við í svarinum frá ríkisumboðnum, so nú átti "mytan" um rentuna at verið burturbeind, men eftir situr óttin fyri, at hetta fer at endurtaka seg, um sitandi landsstýri sleppur att halda fram eftir komandi løgtingsval.

Og tað má ikki henda!

# Búskapargrunnurin

## - ein kekkur til hvønn føroying!?

**Gunnar K Nattestad**

Búskapargrunnurin er aftur uppi at venda. Samgongan hevur endiliga funnið út av at skilja fullveldið burtur úr tí skilagóða, at tryggja øllum føroyingum, núlivandi sum komandi, ein part av inntøkunum frá eingangsinntøkum, m.a. møguligum oljuinntøkum.

Sensatiónin, at nú var breið politisk semja um at seta grunnin á stovn, var avlívað av løgmanni, ið krevur at ein útgjaldsskipan skal uppí lógina beinanvegin. Av tí at semja tykist vera um inngjaldi, vil eg fylgjandi halda meg til møguliga útgjaldsskipan.

Lat meg fyrst siga, at eg haldi tað vera betur at fáa eina breiða semju um grunnin uttan útgjald, heldur enn at einki kemur burtur úr tí útgjaldi skal við. Men hinvegin hevði tað verið gott, at kunna samst um hvat slag av úgjaldi talan skal vera um, áðrenn møguligar inntøkur byrja at koma.

Nakað ið eyðkennir tær inntøkur talan er um, er at tað ikki liggur arbeiði aftan fyri ið samsvar við inntøkuna. Mótsætt flestu inntøkum á fíggjarlógini, so koma hesar inntøkur ikki umvegis føroya fólk ella føroyska vinnu. Tá inntøkur (skattir, Mvg, tollur o.l.) verða kravdar inn eru tað stórt sæð altíð fólk í Føroyum ið líka sum eru "verjar" hjá hesum pengum. Hesi fólk kunna gera sína ávirkan galdandi, m.a. á hvørjum vali og harvið hava tey vald á teimum ið umsiga pengarnar ið koma á fíggjarlógina.

Men oljupengarnir hava ongan "verja". Hettar kann partvíst líknast við blokkin, tó hevur fólkatingið tá ávirkan á hvussu hesir penganir vera brúktir.

Út frá hesum haldi eg tí at tað er umráðandi at oljupengarnir fáa ein verja. Ein máti at gera hettar uppá er við at lata pengarnar fara umvegis borgarnar. "Ein kekkur til hvønn føroying" er kent citat og tað ljóðar sera freistandi - kanska marglætisligt. Men við at lata pengarnar fara umvegis borgaran, slepst undan "foreldraleysum" pengum.

Politikarnir kunna so skatta pengarnar innaftur, men nú er meira javnvág í. Frá at pengarnir so at siga detta niður á fíggjarlógina úr leysum lofti, er nú støðan tann, at borgarin varar av pengunum og tað er mótvegis hesum, politikarin skal verja innkrevjing og nýtslu av "oljupengunum".

Persónliga haldi eg at borgarin í útgangsstøði, er best til at umsita peningin. Onkur heldur kanska at tað er betur at politikarnir umsita útgjaldið beinleiðis, men teir eru eisini vanlig fólk og hevur ein ikki álit á vanliga borgaranum, hví so á politikarunum? Vónandi kunna vit hava álit á báðum.

Sama um vit fáa ein búskapargrunn við ella uttan útgjaldsskipan, er at vóna at hettar kemur ígjøgnum skjótt og at tað verður breið politisk og fólkalig semja, so tað slepst undan at fara til hendurs tá møguligar inntøkur koma.



# IRF leggur dent á endurnýtslu

RUSKINNSAVNAN
**Ragnhild Ellingsgaard**



**Klaksvík:** Gjøgnum farna árið hevur IRF lagt seg eftir at skilja alt burturkast á ein slíkan hátt, at tað kann sendast víðari til endurnýtslu.

Endurnýtsla er eitt nýtt hugtak í føroyskum høpi, sum IRF hevur roynt at fingið fólk at tikið til sín. Hetta verður millum annað eisini gjørt í nýggja álmanakkanum, sum IRF gav út í byrjanini av hesum árinum.

### Stór broyting farin fram

Interkommunali Renovatións Felagsskapurin tekur sær stutt sagt av øllum viðvíkjandi tí burturkastinum, sum hvørt húsarhald dagliga letur av sær.

Teir bera okkum ruskposar til dyrnar, teir avheinta teir og teir burturbeina alt ruskið.

Felagsskapurin varð stovnaður í 1989, og hevur í dag um 60 fólk í føstum starvi.

Ì byrjanini varð alt rusk og burturkast antin brent ella tyrvt, men í dag verður ein stórur partur av hesum sendur til Danmarkar til endurnýtslu.

Hetta veri seg pappír, jarn, dekk og eisini stórsekkir til alibrúk.

### Hvørt húsarhald tríggjar posar

Ì dag fær hvørt húsarhald tríggjar posar at koyra burturkastið í; ein hvítan posa til reint og turt pappír, ein grønan posa til vandamikið burturkast og eisini ein gráan posa til alt, ið skal brennast.

À hendan hátt byrja fólk longu heima at skilja burturkastið, og sparir hetta nógv uppá brenniovnin hjá IRF, sum stendur í Leirvík.

– Sum heild hava fólk tikið væl ímóti nýggju skipanini við trimum ruskposum, og vit fáa nógvar positivar viðmerkingar allastaðnis frá, sigur Victor Dánjalsson, sum hevur dagligu ábyrgdina av viðurskiftinum hjá IRF í Norðuroyggjum.

### Nýggjur álmanakki

Ì byrjanini av hesum árinum gav IRF ein álmanakka út, sum saman við vøkrum myndum skal hjálpa og rættleiða fólki viðvíkjandi viðgerðini av burturkastinum.

Eisini verður skilliga greitt frá, hvør bygd hoyrir til hvat øki, og nær posarnir verða heintaðir á teim ymsu økjunum.

À baksíðini á hvørjari mynd er tekstur skrivaður, ið sigur frá ymsum viðurskiftum viðvíkjandi burturkasti.

– Fólk eru sera glað fyri álmanakkan, og tey brúka hann nógv, frætta vit frá Victor.

### Alt landið undantikið Suðurstreymoy

Fyri eini tíð síðani legðist Vágoyggin eisini undir økini hjá IRF, og í teim komandi vikunum koma Sandoy, Nólsoy, Suðuroy og Skúvoy eisini undir IRF. Tað vil siga, at IRF tá fer at taka sær av viðurskiftunum viðvíkjandi burturkasti í øllum landinum, tó undantikið Suðurstreymoy, sum hevur sína egnu skipan.

# Hølistrupulleikar

**Tað er áhugi fyri at skipa fyri dansi í Klaksvík, men tað er ótrúliga torført at finna eini høli, sum egna seg til endamálið**

UNGDÓMSDANSUR
*Solby A. Eliasen*



*Jan Gardar rak Lognbrá tann tíð tað var.*

**Klaksvík:** Jan Gardar, sum rak Lognbrá, dansistaðið fyri ung undir 18 ár, í Klaksvík, sigur, at tá ið Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at tað er ongin áhugi at skipa fyri dansi fyri ungum í Klaksvík, so er tað ikki heilt rætt. Tað er áhugi fyri tí, men har er onki høli til taks. Jan og aðrir, sum hava roynt at fáa eitt dansistað upp á føtur í Klaksvík, siga, at teir hava tosað við bæði núverandi býráð og tað býraðið, sum sat áðrenn, um trupulleikan, men tað tykist, sum ongin loysn er á málinum.

### Arbeitt longi við málinum

Teir hava havt eitt upplegg um at gera gamla spinnaríið uppi við Borðoyarvík til eitt diskotek. Uppskotið var, at teir skuldu skipa fyri ístandgerð og rinda allar útreiðslur ið standast av hesum, meðan Býráðið skuldi syrgja fyri eini niðankoyring til húsið, men undanførslan hjá Klaksvíkar Býráð hevur verið, at tað er eitt ídnaðarøki, og tað tí ikki hóskar seg at hava dans har, sigur Jan Gardar.

– Vit hava ikki fingið nakað meira ítøkiligt svar enn hatta, hóast vit hava rykt eftir tí í langa tíð nú.

Jan og teir hava ikki bert spurt á spinnarínum, teir hava verið nógva aðrastani eisini, men tað sær ikki út til, at nakað kann lata seg gera. Jan og co. ynskja, at kommunan útvegar, ella í øllum førum hjálpir til við at finna, eini hóskandi høli til hetta endamálið.

– Eg hevði so avgjørt hildið fram við diskotekinum, um høli vóru til taks, sigur Jan Gardar, sum heldur, at tey ungu hava verið sera tolin viðvíkjandi hesum máli.

– Eg var bangin fyri, at okkurt líknandi fór at henda beinanvegin aftaná at Lognbrá lat aftur.

### Kommunan ikki útvega høli

Hinvegin sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, at tað er ikki uppgávan hjá kommununi at finna høli til at hava dans í. Men hann er samdur í, at tað er hølisspurningurin, sum er tann heilt stóri trupulleikin í hesum málinum.

– Vit hava enn ikki funnið nakað hóskandi høli til ætlaða ungdómshúsið, sum vit hava arbeitt við nú í skjótt eitt ár. Tað má vera eitt trygt stað, har tey ungu kunnu halda til undir skipaðum eftirliti, tí at um nakað hendi, og trygdin ikki er í lagi, so... ja, eg orki ikki at hugsa um tað. Tí tekur tað so langa tíð at finna eitt hóskandi høli.

Tað letur sostatt til, at spurningurin um eitt høli til ungdómin í Klaksvík næstan ikki er til at loysa, men heldur vorðin ein bóltur, ið verður kastaður í millum almennar myndugleikar og privatpersónar.

# Trølla Pætur í Frankaríki



*Trølla Pætur og hini framleiða nýtt sjónband*

UNDIRHALD
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Sunnudagin komu Trølla Pætur, Omman og Trølla Ossi aftur til Føroyar, eftir at tey í eina góða viku hava verið í Frankaríki í sambandi við eitt nýtt sjónband, ið verður framleitt í løtuni.

Ein triðingur av sjónbandinum er longu tikið upp í Føroyum, og nú eru so nakrar myndir komnar í kassan afturat. Hesar myndir eru tiknar av Trølla Pæturi og hansara harkaliði, meðan tey leita eftir nøkrum jólamonnum í teim fronsku Alpunum.

Eisini Erling Politistur er við á tí nýggja sjónbandinum. Hann hevur elt Trølla Pætur allan tann langa vegin til Frankaríkis, og á sjónbandinum fær hann eisini onkra hjálpina frá tí fronsku løgregluni.

Um Erling far fatur á Trølla Pæturi, tað sigur søgan tó einki um.

Ætlanin er, at sjónbandið skal verða víst í teim føroysku biografunum tann 1. oktober, og tann 1. november verður sjónbandið at fáa til keyps í sølubúðum kring landið.